




Puntur nr. 24

# Vel rætta song á ferðini

**Er hotellið gott, er ferðin góð. Soleiðis er tað næstan hvørja ferð, ein er og ferðast. Men hvussu skal ein velja ímillum tey túsund hotell sum eru?**

HOTELL
*Orð & mynd: Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

»At ferðast er at livað«. Tað segði kenda danska skaldið H. C. Andersen. Tað, sum ofta avmarkar okkara ferðir, er kostnaðurin. Tað kostar nógv at koma á staðið, og ofta er tað sera dýrt at búgva á hotelli á ferðamálinum.

At gjalda 1000 krónur pr nátt er onki óvanligt í einum stórbýi. Í býum sum London og Paris er hetta prísurin fyri eitt rættuliga vánaligt hotell í háárstíð.



*Hotell Fron liggur sera væl fyri í hjartanum á Reykjavík*







*Hotel Fron er eitt nútímans íbúðarhotell*

### Pakkaferð

Ein máti at koma uttan um hesar ræðuprísir er sjálvandi at búgva hjá fólki ein kennur. Men um tú ikki hevur familju runt um, er eitt gott hugskot at keypa eina pakkaferð. Tá hevur felagið, sum ein keypur ferðin frá, ofta forhandlað prísin niður. Tey lova hotellinum at fáa nógvar gestir, og fáa tí ein bíligari prís.

Atlantic Airways hevur fleiri slíkar pakkaferðir til øll støðini, tey flúgva til. Sosialurin hevur verið í Reykjavík og roynt »Reykjavíkspakkan«. Vit búðu á Hotel Fron, eitt miðalklassahotell í hjartanum á Reykjavík.

### Tríggjar stjørnur

Tann klárbláa fasadan ger tað næstan ógjørligt at ikki síggja Hotel Frón á Laugarvegi í Reykjavík.

Hotellið hevur tríggjar av fimm stjørnum og er sera modernað. Tað er eitt sokallað íbúðarhotell, har køkur er inni í kømurunum. Hotellið hevur 54 kømur og er í fýra hæddum.

Hóast at hotellið liggur á høvuðsgøtuni er tað stak friðarligt, og ein verður ikki órógvaður av náttarlívinum.

Um ein vil luttaka í náttarlívinum kann eg næstan ikki hugsa mær betri stað at búgva eftirsum hotellið liggur so sentralt.

Morgunmaturin er einkul men frískligur við nógvum góðum rávørum. CNN stendur frá konstant eftirsum nógvir amerikanarir búgva á hotellinum.

Kømurini hava øll egið baðirúm, telefon, minibar, sjónvarp og kassaskáp. Prísurin er yvirkomuligur – um summarið kostar eitt dupultkamar 1,283 krónur og um veturin er prísurin 783 krónur.

Les meiri á www.hotelfron.is

### Vert at hugsa um, tá tú bíleggur hotell

– Hvat er tú fyri menniskja, og hvørji krøv hevur tú?

– Er tað okey við bara einari song – vel so eitt vallaraheim ella pensjonat

– Vil tú hava tað behagiligt men ikki gjalda so nógv er best at velja eitt tvey ella trístjørnað hotell

– Vil tú brúka nógva tíð á hotellinum og njóta lívið er eitt fýra ella fimmstjørna hotell tað besta.

– Kanna hotellið á internetinum, hvat skriva onnur um hotellið, og hvussu síggja myndirnar út?

– Hygg hvar hotellið liggur. Liggur tað langt uttanfyri og tú noyðist at taka taxi hvørjuferð tú skal í býin ella á strondina verður tað dýrt.

– Bóka á internetinum, men ring gjarna fyri at kontrollera at alt er í ordan

### Tá tú kemur til hotellið

– Ver ikki bangin fyri at skifta rúm (ella hotell) um tað ikki er tað tú hevði væntað tær.

– Læs tíni ting inni. Tíanverri kann ein sjáldan líta á reingerisfólkið á hotellinum.

– Flestu hotell hava skelti um, at ein skal leggja handklæði á gólvið, um tú vil hava tað skift út. Hetta er fyri at verja umhvørvið. Men stór ferðabløð vilja verða við, at hetta eisini hevur við sær, at handkkløð og seingjakæði ikki verða skift út millum gestirnar. Kanna tí gjølla, at alt er reint tá tú kemur til hotellið.

– Ver krevjandi! Tit gjalda nógv fyri at búgva, og tí skal tænastustøðið eisini verða høgt.

Góða ferð!




